**200202283/4**

# Reglugerð

**fyri viðgerð av umsóknum um loyvi**
**til leysar sølubúðir í Tórshavnar kommunu**
**(t.e. pylsuvognar, matvognar, tjaldbúðir, o.ø. rullandi sølubúðum og tílíkum)**

1. Heilsu- og umhvørvismyndugleikin í Tórshavnar kommunu avgreiðir umsóknir um loyvi til sølubúðir og sendir ummæli til løgregluna, sum útskrivar loyvi.

2. Sølubúðin skal hava neyðuga góðkenning frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni sambært galdandi matvørulóg.

3. Sølubúðin skal setast eftir ávísing frá byggimyndugleikanum og vegamyndugleikanum í Tórshavnar kommunu.

4. Um ætlanin er at seta sølubúðina á privatan veg, skal undirtøka haraftrat verða fingin fyri hesum frá ánaranum av vegnum.

5. Sølubúðin skal hava nøktandi tal av ruskíløtum til nýtslu hjá viðskiftafólkunum.

6. Økið uttan um sølubúðina skal haldast reint og ruddiligt, meðan opið er. Støðuplássið skal beinanveg eftir afturlating gerast reint og ruddast fyri órudd og burturkast, sum stavar frá sølubúðini.

7. Tórshavnar kommuna kann taka viðmælið aftur, um hesar ásetingar ikki verða fylgdar, og annars, um tað vísir seg, at sølubúðin verður nýtt til annað endamál, enn upprunaliga loyvi bleiv latið til.

8. Heilsu- og umhvørvismyndugleikin í Tórshavnar kommunu hevur eftirlit við, at hesar ásetingar verða fylgdar.

9. Avgerðir tiknar eftir hesi reglugerð kunnu ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika.

Samtykt á býráðsfundi 28. november 2002.